Heilsuliga skadd fáa einki arbeiði

- Eftirløn verður nýtt sum eitt slag av trygdarneti fyri at sleppa undan at seta heilsuskadd og rørslutarnað í starv, sigur Doris Hansen, formaður í Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum

ARBEIÐSFØRLEIKI
Ingrid Bjarnastein

Doris Hansen, formaður í Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum

Føroyar hava ongan skipaðan politikk viðvíkjandi arbeiði hjá heilsuliga skaddum.

- Heilsuskadd fáa bara eftirløn, og eru nógv fólk ónøgd við hetta, tí arbeiðið er ofta nakað, ið sigur eitt sindur um tín samleika, sigur Doris Hansen.

- Tað vísir seg, at tað er arbeiði til allar hendur í Føroyum, og tí skuldu heilsuskadd eisini havt arbeiðsmøguleikar.

Grannalond okkara hava øll eina skipan hesum viðvíkjandi.

Sum dømi kann nevnast, at í Danmark hava heilsuskadd møguleika fyri "flexjob", "skåne-job" og eisini arbeiða við hjálpara, meðan vit ikki hava nakað av hesm slagi í Føroyum.

Óvirkin skipan

Fyri nøkrum árum síðani varð eitt ískoyti í forsorgarlógini sett í gildi, sum sigur, at tað kunnu játtast vard størv, umskúling og annað til avlamin og onnur, sum hava avmarkaðan vinnuførleika.

- Hetta kom í gildi fyri 4 árum síðani, men skipanin er enn óvirkin, tí fólk duga ikki at umsita hana, sigur Doris Hansen.

- Tað er soleiðis, at um eitt fólk, ið hevur verið í vinnu, og síðan verður avmarkað á ein ella annan hátt í arbeiðsførleika, so eigur viðkomandi at fáa eina umskúling, so at hann kann fáa eitt starv, har hann er førur fyri at arbeiða. Men soleiðis er tað nærum ongastaðni.

- Tað eru nógv arbeiði, ið heilsuskadd kundu gjørt. Vit hava onkur vard verkstød, men tey eru fyri menningartarnað. ALV hevði eitt verkstað, serliga fyri rørslutarnað, men tað varð niðurlagt, tí ongin leiðari var.

Nú ætlar ALV at taka hetta uppaftur, og hava tey leigað høli í Smiðjugerði til hetta endamál.

Hugburðurin má broytast

- Tað er ofta ein spurningur um hugburð hjá arbeiðsgevara og fakfeløgum um tey vilja taka ein við skerdum arbeiðsførleika á arbeiðsplássið. Tað er eisini ein spurningur um viðkomandi verður sæddur, sum ein byrða, ella sum tilfeingi, sigur Doris Hansen.

- Politikkararnir tosa um hendan trupulleikan upp undir hvørt val, men tað verður ongantíð til meira enn tos. Ein viðtøka úti í landstýrinum sigur annars, at ein og hvør almennur stovnur (við ávísari stødd) skal hava eitt til tvey brekaði í arbeiði, men heldur ikki hetta er nakrantíð gjøgnumført.

- Í hesum teldutíðum skuldi tað uttan trupulleikar verið møguligt við upplæring soleiðis, at heilsuskadd eisini kunnu fáa arbeiði. Vit høvdu eitt uppskot uppá 40/60. Tað vil siga, at arbeitt verður 60%, og harav skal Almannastovan gjalda 40% av lønini, fortelur Doris Hansen.

Fundur

Hesi evnini verða tikin upp á pallborðsfundi 7. novembur 2001. Pallborðsfundurin verður um arbeiðsmøguleikar hjá heilsuliga skaddum.

Við vera Sámal Petur í Grund, Bjarni Djurholm, Petra Joensen, stjóri á Almannastovuni, Marius Dam, løgtingslimur, Vilhelm Johannesen, formaður í Arbeiðsgevarafelagnum, Pál Weihe, lænknaligur ráðgevi á Almannastovuni, Gunnleivur Dalsgarð, formaður í starvsmannafelagnum, Kristina Larsen, fyristøðufólk í Alv og Ingrid Jacobsen fyri Meginfelag teirra brekaðu.

Kvøldskúlaskeið í kreativum lýsingum

-Sum nakað nýtt fer Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli og Tórshavnar Listaskúli undir nýggja lærugrein, ið eitur Reklamur/Lýsingar

KVØLDSKÚLI
Ingrid Bjarnastein

Ein av nýggju lærugreinunum í vetur hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla er Reklamur/Lýsingar. Tað verður Gundur F. Mikkelsen, ið kemur at undirvísa.

- Skeiðið fevnir um allar lýsingar, greiðir Gundur F. Mikkelsen frá.

- Tekstur, print, sjónvarp, útvarp og so framvegis. Eisini verður undirvíst í lýsingaávirkan og sálarfrøðini aftanfyri. Í Føroyum eru vit ikki so frammalaga lýsingum viðvíkjandi. Sum oftast er tað bert tekstur og prísur, meðan í útlondum brúka tey nógv tað sálarfrøðisliga og løtumyndir.

Skeiðið er á merkonom/teknonom støði. Sjálvur hevur Gundur útbúgving sum merkonom, og hevur hann eisini tikið nakrar lærugreinar víðari til teknonom.

- Tey, sum hava hoyrt um hetta, halda, at tað er eitt gott hugskot, sigur Gundur F. Mikkelsen. -Hetta er jú tað, sum fer at henda í Føroyum. Serliga nú tá nógvar fyritøkur, ið hava havt monopol fáa kapping. Í Føroyum eru eisini fá, ið hava útbúgving á hesum økinum. Tey flestu eru grafikkarar ella okkurt tílíkt.

Ætlanin er, at skeiðið skal byrja komandi mánakvøld.

Avlopið minkar

Landskassaavlopið minkar munandi komandi ár, vísir fíggjarlógaruppskotið , sum var lagt fram í tinginum í gjár

FÍGGJARLÓG
Edvard Joensen

Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, legði í gjár fram fíggjarlógaruppskot, sum hevur munandi minni avlop, enn tað seinasta
Mynd: Jens Kristian Vang

Rakstrar- og løguavlop landskassan, sum seinastu árini hevur ligið oman fyri 500 milliónir, fer komandi ár at verða 159 milliónir krónur, vísir fíggjarlógaruppskotið fyri komandi ár, sum varð lagt fram í gjár.

Samstundis sum heildarveitingin er minkað við 356 milliónum (blokkurin), fara útreiðslurnar at vaksa við 278 milliónum krónum, segði Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, tá hann legði fíggjarlógina fram á gjár.

Roknað verður við eini minking upp á 7,1% í inntøkum landskassans komandi ár, sigur Karsten Hansen. Hendan minkin kemst av, sigur hann, at teimum 356 milliónunum í heildarveitingini.

Yvirtøkur fara komandi ár at kosta 386 milliónir krónur, sigur uppskotið. 256 milliónir fara sambært § 9 í heimastýrislógini til skúlamál og almenna forsorg, meðan hinar 30 milliónirnar fara til beinleiðis yvvirtøkur sum Skipaeftirlitið, Vága Floghavn, neyð- og trygdartænastu og MRCC.

Tíðindafundur varð hildin í Norðulandahúsinum beint eftir, at fíggjarlógaruppskotið var lagt fram í tinginum. Á fundinum í Norðurlandahúsinum greiddi landsstýrismaðurin nærri frá uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2002.

Hann segði millum annað, at høvuðsraðfestingarnar í fíggjarlógaruppskotinum eru eldrarøkt, fólkaskúlin, fiskiveiðieftirlitið og samferðsla.

Nógv tann størsti íløguposturin á komandi fíggjarlóg er ætlaður vinnumálum. Vinnumál fáa 152,6 milliónir komandi ár. Av hesum er tað samferðslan, sum fer við tí stóra partinum. Nevnd verða mál sum nýggja Suðuroyarskipið, ferjulega á Syðradali í Kallsoy og Gásasalstunnilin, sum verða tey stóru útreiðslumálini á samferðslusíðuni. Av hesum er Suðuroyarskipið sett til 90 milliónir krónur.

Síðan koma almanna- og heilsumál við 53,4 milliónum, útbúgving og gransking við 12.25 milliónum og Løgtingið við 10 miliónum krónum til íløgur komandi ár.

Løgmansfyrisitingin og fiskivinna fáa hvør sínar tvær miliónir at gera íløgur fyri í 2002.

Samanlagt verður sagt í frágreiðingini hjá Karsteni Hansen, landsstýrismanni, at løguútreiðslurnar verða 13% hægri, enn roknað varð við á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2001.

Karsten Hansen fegnaðist um at kunna siga frá, at fólkaskúlin hesaferð fær eina rættiliga stóra hækking. Tilsamans fær fólkaskúlin 21 milliónir meira at arbeiða við komandi ár enn í ár. Av hesum eru 12 milliónir settar av til lønir í fólkaskúlanum, meðan restin fer til beinleiðis menning av skúlanum, segði landstýrismaðurin.

Eldrarøktin er mál, sum er raðfest í ovara enda, segði Karsten Hansen í framløguni. Tann posturin fer eisini at vaksa við 21 milliónum krónum. Tær verða býttar soleiðis, at tær 10 milliónirnar fara til lønir, meðan hinar 11 milliónirnar so eru til rakstur annars.

Tær 159 milliónirnar, sum sambært fíggjarlógaruppskotinum far at loypa av komandi ár, skulu brúkast soleiðis, at tær 141 milliónirnar verða afturgoldnar danska statinum, meðan hinar 18 milliónirnar verða settar í Landsbankan til konsolidering av landskassanum.

Gjaldføri landskassans er betra munandi seinnu árini, vísti Karsten Hansen á. Tað verður við árslok 2002 mett at fara at verða umleið 2,3 milliardir krónur, meðan tað, tá tað ringast stóð til í 1992 var væl niðan fyri ta einu milliardina.

ntu r yt n

Sum vl n vs n stu r ntu- r yt n n h nsk 'T nk - num r yt r F r y nk v l ir 1. kl r 2 l r ntust n nn- tl n.

Innl n

ntust n nnl n l ks v n tl 1/2 st. Il v s r ntust n v r sum n nfyr v st.

Innl n v n s n

S l - 1 kr.	3
1 - 3 kr.	3,5
3 - 1. kr.	3,75
1 - kr.	4
N s k nt	4
N sl K nt IN	2,5
U s n -K nt IN	4
st r s nt (+3 stu)	3
r k nt / r s nt	4,5

dn k r tt r

ntust n l stu tl n n - v tun sum v n l un l ks v 1/4 st.

Fyr st l n v r r nt n h n

1. v r ur	r 5
nu st n	-

nt n ll nun v r nr

In - 1	,25
In - 25	7,25
r k t r	,25

N r l s n r un n v r ntust n f st fr kun v vun n s ns.

Fíggjarlógaruppskotið í 2002

RLÚ-avlopið verður 159 mió. kr. í 2002

Avlop landskassans

Landskassin hevur havt stór avlop og lagt nógvan pening til siðis seinastu árini. RLÚ-avlop landskassans hevur verið omanfyri 500 mió. kr. seinastu árini, men verður 159 mió. kr. næsta ár, sí mynd 1. Orsokin til minkaða avlopið er minkaða heildarveitingin.

Mynd 1: Avlop landskassans, 1997-2002.



Talan í talsnu fyri 1997, 1998, 1999 og 2000 er eftir landsrokningunni. Talan fyri 2001 er fyrireikaði seinnagar, og talan fyri 2002 er úr fíggjarlógaruppskotinum 2002.